Pílurin boygna›i uppeftir

Fyri flestar av føroysku leikarunum var felagsnevnarin sunnudagin, at teir eftir ein minni gó›an fyrra hálvleik spældu ein betri seinna hálvleik

JÁKUP MØRK

2-2 javnleikurin móti slovenum fer ivaleyst at standa frammarliga í minni hjá bæ›i leikarum og vi›haldsfólkum hjá landsli›num.

Gle›in um javnleikin kann tó ikki káva útyvir, at føroyska li›i› í fyrra hálvleiki tóktist at hava ein av teimum ringu døgunum, men tíbetur broyttist hetta seinna umfari›.

Ni›anfyri ver›ur gjørt ein roynd at l‡sa avriki› hjá einstøku leikarunum, og sum heild er ta› sama at siga um leikararnar, sum um dystin. Fyrri hálvleikur var lakur, me›an nógv meira fer› kom á seinna umfari›.

Jákup Mikkelsen, Herfølge BK

15 dystir/0 mál

Eftir gerab‡ti vi› Jens Martin Knudsen í dystinum móti Danmark var Jákup aftur fyrsta val millum stengurnar sunnudagin, og hesa uppgávuna loysti hann til reint UG.

Var sera tryggur, tá bo› vóru eftir honum, og tey bæ›i slovensku málini kann málverjin ikki lastast fyri. Er sera t‡dningmarkikil í føroyska verjuspælinum, tí bótførleiki hansara ger, at spælararnir altí› kunnu spæla bóltin til hansara. Eisini hóast hetta í ávísum førum sá rættuliga vágafult út.

Hans Fró›i Hansen, Sogndal IL

13/1

Spældu sum vit eftirhondini eru von vi› at síggja hann. Vi› stórum myndugleika í luftrúminum, og kom eisini væl ímillum nakrar fer›ir, tá slovensk álop skuldu ste›gast.

Hevur tó framvegis trupulleikar í avspælinum, men sunnudagin var hetta partvíst orsaka› av, at avleveringsmøguleikarnir í nógvum førum vóru sera fáir. Tykist tó at hava ment seg nógv í spælinum á jør›ini, sí›ani skifti› til Sogndal, og stendur menningin vi›, eigur hann uttan iva nógvar dystir afturat á landsli›num.

Óli Johannesen, AGF

46/1

Verjuskansin taldist aftur hesufer› millum teir stinnastu á føroyska li›num. Tóktist sera tryggur í verjupartinum, og s‡ndi eisini lei›araevni, tá hann av aftasta manni st‡rdi verjufelagum sínum.

Ta› kemur tó framvegis naka› ofta fyri, at adressuleysir bóltar ver›a sendir ni›an eftir vøllinum, men eins og ta› var galdandi hjá Hans Fró›a, komst hetta eisini av, at so fáir leikarar bjó›a›u seg fram.

Einki er at ivast í, at Óli stevnir móti teimum fimti dystunum vi› fullari fer›.

Jens Kristian Hansen, B36

36/2

Saman vi› verjufeløgum sínum var Jens Kristian partur av teirri føroysku eindini, sum samanumtiki› rigga›i best.

Føroyski li›forma›urin, sum at enda fekk eina ógloymandi fø›ingardagsgávu frá systkinabarninum, Øssi, leikti vi› stórum myndugleika allan dystin.

At hann eisini megnar at blanda seg í spæli›, samstundis sum hann hev›i til uppgávu at ansa størstu slovensku stjørnuni, Zahovic, vitnar eisini um klassa. Ta› dregur tó ni›ur, at 2-0 máli› kom eftir eina misskiljing millum li›formannin og Kurt Mørkøre.

Ein kundi framvegis ynskt, at Jens Kristian hoyrist betri sum li›skipari, og kanska er hetta eisini um at koma, tí í einstøkum førum sunnudagin var hann langt uppi á vøllinum, fyri at leiðbeina vi›leikarum sínum.

Allan Mørkøre, HB

51/1

Hóast vánaliga avriki› móti dønum, hev›i Allan fingi› afturval til dystin móti Slovenia, og hann prógva›i eisini í ávísan mun, at hann framvegis skal teljast millum teir føstu á landsli›num.

Ta› væntar tó naka›, á›renn hann er á sama stø›i›, sum hann fyrr hevur s‡nt, og serliga í fyrra hálvleiki hev›i hann sera stórar trupulleikar í verjupartinum, har hann fleiri fer›ir var› yvirspældur.

Eins og flestu vi›felagarnir spældi hann seg tó væl upp seinna umfari›. At hann fekk betri fatur í verjupartinum vi›førdi eisini, at hann gjørdist meira frígjørdur í framrætta›a spælinum.

Ta› telur sjálvandi eisini vi›, at hann var upphavsma›ur til útjavningina, tá hann fekk frísparki›, sum Øssur skora›i uppá, eins og hann í fyrra hálvleiki sendi eina perlu av einum innleggi móti høvdinum á Toda.

Julian Johnsson, Sogndal IL

34/1

Í heildarmetingini av avrikinum var Julian avgjørt millum bestu føroysku leikararnar. Einamest tí hann altí› leggur eitt rimmar arbei›savrik eftir sær.

Var í fyrra hálvleiki eitt av fáu føroysku ljóspunktunum, og eisini í seinna hálvleiki var hann sjónligur, tó at fleiri li›felagar tá nærka›ust stø›i hansara.

Seinastu dystirnar hevur ta› eisini tókst, at nógv størri umhugsni liggur aftan fyri avger›ir hansara, og ger hetta, at meira nytta fæst burtur úr arbei›sgrevinum.

Bóltførleikanum væntar tó framvegis naka›, og ta› kom eisini nakrar fer›ir fyri, at dragingar hansara gjørdist ov langar.

Sámal Joensen, Leiftur

17/0

Í fyrra hálvleiki var Sámal langt undir ta›, hann vanliga megnar at vísa, og í hvussu so er hesa løtuna mundi talan vera um lakasta avrik hansara í føroyska landsli›sbúnanum.

Fekk eins og vanligt fatur í nógvum bóltum, men alt ov ofta vór›u hesir tveittir burtur, eins og hann alt ov ofta misti bóltin, tá hann royndi at draga framvi› mótstø›umonnum

Eins og li›felagarnir kom gøtuma›urin tó betri vi› í seinna hálvleiki, og móti endanum av dystinum, taldist hann millum mest sjónligu leikararnar á føroyska li›num. Fekk tá fatur í enn fleiri bóltum, og hóast skeivar sendingar framvegis komu fyri, var hann upphavsma›ur fyri fleiri føroyskum álopum seinastu løtuna.

At ta› ongantí› kom upp á tal at skifta mi›vallaran út, bo›ar frá, at venjarin framhaldandi hevur stórt álit á Sámali, og ta› er helst einki at ivast í, at komandi avrik hansara fara at ver›a meira sannførandi í samfullar 90 minuttir og ikki bara teir seinastu 30.

Todi Jónsson var í fyrra hálvleiki fleiri flokkar omanfyri flestu av li›feløgum sínum, og vi› eitt sindur av hepni, kundi hann eisini lagt Føroyar fram um

Mynd: Álvur Haraldsen

John Petersen, Leiftur

27/2

Skálama›urin megna›i so at siga ongantí› í dystinum at átaka sær tann leiklut, sum hann aloftast hevur havt á føroyska landsli›num.

Sjáldan megna›i hann at halda upp á bóltin, og serliga í fyrra hálvleiki vóru sendingarnar oneyvar og bólttapini nógv. Undantaki› var tó, tá hann vi› frágera væl sendi Allan Mørkøre avsta› í vandamesta føroyska álopinum fyrru tr‡ korterini.

Heldur ikki í seinna hálvleiki megna›i John serliga sannførandi at seta sítt frámerki á dystin, so fyri hansara vi›komandi ver›ur ta› einamest orsaka› av úrslitinum og dramatikkinum í hesum, at dysturin ver›ur varveittur í hugaheiminum.

Øssur Hansen, B68

40/2

Á heimabeitinum, Svangaskar›, mundi Øssur vera t‡›iligasta dømi um misjavna føroyska avriki› í ávíkavist fyrra og seinna hálvleiki.

Fyrstu tr‡ korterini hev›i hann alstórar trupulleikar í verjupartinum, og hóast hann í fleiri førum kom væl framvi›, tóktist trupult at senda bóltarnar innfyri.

Seinna hálvleik var fullkomuliga vi›vent í holuni, og stórur partur av føroysku álopsroyndunum komu úr hansara bor›i.

At hann so at enda kundi krúna verki› vi› at senda eina frísparksperlu upp í slovenska málhorni›, og harvi› geva systkinabarninum eina ógloymandi fø›ingardagsgávu, setti bara prikkin yvir i'i›.

Uni Arge, ÍA Akranes

31/7

Hóast hann í summar hev›i ein langan ste›g vegna ska›a, tykist Uni longu at hava funni› stevi› aftur.

Arbeiddi meira enn vanligt allar 90 minuttirnar, og hóast stu›ulin frá mi›vøllinum til tí›ir var sera lítil, royndi hann alla tí›ina at arbei›a fyri li›num.

Máli› var eitt rættuligt forward-mál, har vakurleikin kemur í a›ru rø›, og solei›is eigur ein áleypari eisini at hugsa.

Hóast kappingin um álopsplássini er har›na, nú Kurt er vi› aftur, tykist Uni á ongan hátt at vera fallin í fátt, tvørturímóti.

Todi Jónsson, FC København

41/9

Største føroyska stjørnan vísti serliga í fyrra hálvleiki, at hann eisini er ma›ur at liva upp til heiti›.

Slovenar tóktust hava stóra vir›ing fyri honum, og hóast arbei›sumstø›urnar als ikki vóru av teimum bestu, gekk hann á odda fyri li›feløgunum allan hálvleikin.

Seinna umfari› var hann ikki eins ey›s‡ndur, men hetta komst av, at li›felagarnir nú komu betri vi› í spæli›, og ikki øvugt.

Noyddist út, tá ska›in í lærinum breyt upp, men fram til tá var hann klárt besti føroyski leikarin. At hann so hev›i sínar trupulleikar vi› at sleppa út um sí›ulinjuna er ein onnur søga, men alt enda›i væl, tá hann takka›i dómaranum fyri ómakin.

Kurt Mørkøre, Sogndal IL

31/2

Kom á vøllin, tá Todi Jónsson noyddist út, og í nógv størri mun enn móti dønum, megna›i hann at seta dám á dystin.

Vi› styrki síni royndi hann fleiri at troka seg fram um mótstø›umenn sínar, og eina gó›a roynd vi› høvdinum gjørdist eisini talan um.

Hóast ta› enn ikki tykist solei›is, at hann hevur skúgva› Una Arge til viks í kappingini um næsta álopsplássi›, so prógva›i hann í øllum førum, at hann er eitt upplagt alternativ til sessin.

Jóhannis Joensen, HB

7/0

Kom á vøllin fyri ein skaddan John Petersen, og fall sera væl inn í spæli› alt fyri eitt.

Tóktist róligur, tá hann hev›i samband vi› bóltin, og s‡ndi eisini dirvi og frekleika, tá hetta gjørdist ney›ugt, og ta› er gle›iligt at sta›festa, at hann nú tykist vera komin rættuliga fyri seg aftur.

S‡ndi eisini sjálvsálit, og royndi seg í tveimum førum vi› skoti útifrá, tá bólturin kom út úr slovensku verjuni. Anna› av hesum enda›i eisini í málinum, umvegis fótin hjá Una Arge.

Regin er Atlantsrisin

Regin Vágadal vann endiliga sína egnu kapping, men leingi stóð nógv á, áðrenn sigurin varð tryggjaður

Jákup Mørk

Tað var ikki hissini mótstøða, sum Regin Vágadal hevði fingið sær, tá triðja kappingin um Atælantsrisan stóð á skránni.

Tveir fyrrverandi vinnarar av kappingini um at gerast heimsins sterkasti, vóru millum luttakararnar, og allir átta høvdu roynt seg í finaluni í somu kapping.

Góðar greinar

Tað var sum so eingin loyna, at nógvar av kappingargreinunum hóskaðu sera væl til Regin, og tí kom tað ikki heilt óvart á, at okkara risi vann kappingina.

Tað var tó galdandi fyri fleiri av hinum luttakarunum, at teir eisini vóru sterkir í somu greinum, sum Regin, og eitt nú tykist Magnus Samuelsson at hava júst somu favoritt greinar, sum Regin.

Sostatt var hetta við vali av kappingargreinum sjálvsagt ein góð fortreyt hjá Regini, men hinvegin kann hetta á ongan hátt borga fyri einum samlaðum sigri.

Tað, sum kanska var mest merkisvert við kappingini, var, at veruliga avgerin fall í kappingin, Dead Lift Hold. Hetta er vanliga ikki ein av allarbestu greinunum hjá Regini, men hann megnaði tó at vinna sær eitt annað pláss í hesi, og við júst hesum sigri, gloppaði hann eitt avgerandi hol niður til Janne Virtanen.

Tað var annars júst í eini líknandi íðkan, at Regin meiddi sær økslina, tá kappast varð í Suðurafrika herfyri, so tað er gleðiligt at staðfesta, at økslin hesu ferð helt til trýstið.

Væleydnað tiltak

Sum heild er einki at ivast í, at talan varð um eitt væl eydnað tiltak.

Heilt fitt av áskoðarum vóru komnir til tiltakið, og ivaleyst mundi hetta eisini vera ein partur av frágreiðingini um, at Regin kundi kýta seg so nógv, sum hann gjørdi. Undan kappingini legði Regin eisini dent á, at hetta við heimavøllinum ofta hevði við sær, at tey seinastu 10 prosentini vórðu løgd í royndirnar.

Umframt sjálvar risarnar, sum jú vóru teir, ið fólk fyrst og fremst komu at hyggja eftir, var eisini annað undirhald á skránni. Falskýggjaútlop varð fyri fyrstu ferð framt í Føroyum, og fyri mongu áskoðararnar var hugtakandi at síggja, hvussu útleypararnir kastaðu seg út í himmalin, fyri síðani við sera stórum neyvleika stýrdu seg niður á Skansan.

Sostatt varð talan samanlagt um eitt sera væleydnað tiltak, serliga sæð við føroyskum eygum.

Einki er at siga til, at Regin Vágadal var stoltur leygardagin. Í kapping við nakrar av heimsins sterkastu, hevði hann fyri fyrstu ferð vunnið egnu kapping sína

Mynd: Jens K. Vang



Sjálvt heimsins sterkasti, Janne Virtanen, mátti láta fyri føroyska risanum

Mynd: Jens K. Vang

Wheel Flip er ein av kappingargreinunum, sum Regin hevur ment seg nógv í, og leygardagin varð hann næstskjótastur at koppa 300 kilo tunga dekkinum

Mynd: Jens K. Vang

Umframt sjálva kappingina, var ein partur av undirhaldinum eisini fallskýggjaútlop, sum fyri fyrstu ferð varð sýnt fram í Føroyum

Mynd: Jens K. Vang

Atlantic Giant 2000 Úrslit

Truck Towing, 9 tons

1	Tórfi Ólafsson	28,35 sek
2	Regin Vágadal	30,88 sek
3	Magnus Samuelsen	31,04 sek
4	Janne Virtanen	31,39 sek
5	René Minkwitz	32,42 sek
6	Hubert Dorer	34,20 sek
7	Lazló Fekete	35,49 sek
8	Rob Dixon	35,52 sek

Húsafell Stone, 190 kg

1	Magnus Samuelsson	16,88 sek
2	Janne Virtanen	17,58 sek
3	Regin Vágadal	18,20 sek
4	René Minkwitz	19,36 sek
5	Tórfi Ólafsson	20,58 sek
6	Lazló Fekete	27,11 sek
7	Rob Dixon	29,28 sek
8	Hubert Doreer	Fullførdi ikki

Dead Lift, 5 lyftingar

1	René Minkwitz	400 kg
2	Tórfi Ólafsson	380 kg
2	Hubert Dorer	380 kg
4	Rob Dixon	360 kg
5	Regin Vágadal	360 kg
6	Janne Virtanen	360 kg
7	Magnus Samuelsson	340 kg
8	Lazló Fekete	300 kg

Mill Walk, 400 kg

1	Regin Vágadal	785°
2	Magnus Samuelsson	720°
3	Janne Virtanen	460°
4	René Minkwitz	135°
5	Lazló Fekete	72°
6	Rob Dixon	37,5°
7	Tórfi Ólafsson	20°
8	Hubert Dorer	Fullførdi ikki

Loading Event, 100-180 kg

1	Janne Virtanen	5=44,67 sek
2	Magnus Samuels.	4=26,54 sek
3	Regin Vágadal	4=27,29 sek
4	Lazló Fekete	4=38,94 sek
5	Rob Dixon	4=48,30 sek
6	René Minkwitz	4=56,81 sek
7	Tórfi Ólafsson	3=21,39 sek
8	Hubert Dorer	2=eingin tíð

Wheel Flip, 300 kg

1	René Minkwitz	28,54 sek
2	Regin Vágadal	32,32 sek
3	Janne Virtanen	34,50 sek
4	Magnus Samuelsson	37,27 sek
5	Lazló Fekete	45,65 sek
6	Rob Dixon	46,56 sek
7	Tórfi Ólafsson	51,52 sek
8	Hubert Dorer	61,30 sek

Dead Lift Hold, 500 kg

1	Tórfi Ólafsson	63,35 sek
2	Regin Vágadal	59,38 sek
3	Janne Virtanen	53,37 sek
4	Magnus Samuelsson	53,02 sek
5	René Minkwitz	51,12 sek
6	Rob Dixon	49,53 sek
7	Lazló Fekete	41,35 sek
8	Hubert Dorer	40,16 sek

Loading Event, 6 X 100 kg

1	Janne Virtanen	33,78 sek
2	Magnus Samuelsson	33,84 sek
3	Regin Vágadal	34,70 sek
4	René Minkwitz	37,31 sek
5	Hubert Dorer	39,67 sek
6	Rob Dixon	41,00 sek
7	Tórfi Ólafsson	45,53 sek
8	Lazló Fekete	47,33 sek

Samlaða støðan

1	Regin Vágadal	51 stig
2	Janne Virtanen	49 stig
3	Magnus Samuelsson	47 stig
4	René Minkwitz	42 stig
5	Tórfi Ólafsson	34,5 stig
6	Rob Dixon	24 stig
7	Lazló Fekete	22 stig
8	Hubert Dorer	18,5 stig